

# Frágreiðing um lutfall av varandi orkuframleiðslu 2022

www.sev.fo




# Frágreiðing um lutfall av varandi orkuframleiðslu 2022

## Innihaldsyvirlit

Frágreiðing um lutfall av varandi orkuframleiðslu 2022 .............................. 4
Váttan frá óheftum grannskoðara ................. 6

# Frágreiðing um lutfall av varandi orkuframleiðslu

SEV endurfíggjaði sína langfreistaðu skuld á sumri í 2022, og fekk samstundis til vega nýggja fígging, sum í høvuðsheitum skal nýtast til at fíggja íløgur í varandi orkukeldur.

SEV hevur yvirfyri sínum lánveitarum bundið seg til at røkka nøkur minstamát fyri varandi orkuframleiðslu árini 2022 - 2030. Um lutfallið av varandi orkuframleiðslu ikki røkkur málinum í einum einstøkum árið, skal SEV rinda eykarentu í tíðarskeiðinum, sum lutfallið er lægri enn ásett í lániavtalunum.

Lániavtalurnar hjá SEV áseta fylgjandi lutfall av varandi orkuframleiðslu fyri árini 2022 - 2030:




**ÚTROKNING AV LUTFALLINUM AV VARANDI ORKU**

Lufallið av varandi orkuframleiðsla í einum fíggjarárið merkir lutfallið av varandi orkuframleiðslu í mun til samlaðu orkuframleiðsluna í fíggjarárinum víst í prosentum (útroknað við fylgjandi frymli):

$$\textit{Lutfall av varandi orkuframleiðslu (í \%)} = \left( \frac{\textit{F vindorka + F vatnorka + F sjóvarfals-, sól-, pumpuorka}}{\textit{F tilsaman}} \right) x100$$

har

"F vindorka" merkir framleiðsla í GWh í fíggjarárinum við vindorku;

"F vatnorka" merkir framleiðsla í GWh í fíggjarárinum við vatnorku;

"F sjóvarfals-, sól, pumpuorka" merkir framleiðsla í GWh í fíggjarárinum við sjóvarfalsorku, sólorku og pumpuorku; og

"F tilsaman" merkir samlaða framleiðslan í GWh í fíggjarárinum, íroknað framleiðsla við termiskari orku.

Lutfallið av varandi orkuframleiðslu í einum fíggjarárið merkir lutfallið av varandi orkuframleiðslu í mun til samlaðu orkuframleiðsluna í fíggjaraárinum, víst í prosentum.

Myndin vísir tey mál fyri lutfall av varandi orkuframleiðslu, sum SEV hevur sett sær fyri at røkka árini 2022 - 2030. Málið fyri lutfallið av varandi orkuframleiðslu økist frá 44% til 73% í tíðarskeiðinum frá 2022 til 2030.

**Sum myndin vísir, var málið fyri varandi orkuframleiðslu 44% fyri 2022. Hetta mál er rokkið við einum staðfestum lutfallið upp á 52% varandi orkuframleiðsla í 2022.**

# Váttan frá óheftum grannskoðara

**TIL SEV OG AÐRAR ÁHUGAPARTAR**
Vit hava fingið til uppgávu frá SEV at geva váttan við avmarkaðari vissu um dátur og upplýsingar, sum vit hava fingið frá felagnum, um lutfallið av varandi orkuframleiðslu, samanborið við samlaðu orkuframleiðslu felagsins í tíðarskeiðinum 1. januar – 31. desember 2022.

**NIÐURSTØÐA OKKARA**
Grundað okkara arbeiðið og skjalprógv, sum vit hava fingið frá felagnum, eru vit ikki komin fram á viðurskiftir, sum geva okkum orsøk til ikki at halda, at dátur og upplýsingar um lutfallið av varandi orkuframleiðslu, samanborið av samlaðu orkuframleiðslu felagsins í tíðarskeiðinum 1. januar – 31. desember 2022, eru uttan týðandi skeivleikar og, í øllum týðandi lutum, gjørd í samsvari staðfestar mátingar av varandi orkuframleiðslu. Niðurstøðan eigur at verða lisin í samanhangi við tað, sum er skrivað í restini av váttanini.

**TAÐ VIT VÁTTA**
Okkara uppgávu er at geva eina niðurstøðu við avmarkaða vissu um framlagdar dátur og upplýsingar, ið vit hava fingið frá felagnum, um lutfallið av varandi orkuframleiðslu, samanborið við samlaðu orkuframleiðslu felagsins í tíðarskeiðinum 1. januar – 31. desember 2022.

| Bólkur | Lyklatøl | Arbeiðið |
|---|---|---|
| Umhvørvi | Samlað framleiðsla av varandi orkuframleiðslu | Lutfall, varandi orkuframleiðsla, samanborið við samlaðu orkuframleiðslu |

**OKKARA ÓHEFTNI OG GÓÐSKUSTÝRINGSSKIPAN**
Vit hava hildið ásetingarnar um óheftni og onnur etisk krøv samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru bygd á grundleggjandi meginreglur um falsloysi, partsloysi, yrkisførleika og neyðugt nærlagni, trúnað og yrkisatburð, sum er galdandi í Føroyum. Grannskoðanarvirkið Januar er bundið at halda altjóða standardin um góðskustýring, ISQC 1, og brúkar soleiðis eina umfatandi góðskustýringsskipan, harundir skjalprógvaðar politikkir og mannagongdir viðvíkjandi tí at halda etisk krøv, yrkisstandardar og galdandi ásetingar í lóg og øðrum reglum. Okkara arbeiðið var gjørt av einum óheftum toymi við royndum innan frágreiðingar um burðardygd og váttanir.

**FATAN AV RAPPORTERINGS- OG VIRÐISÁSETINGARHÁTTUNUM**
Upplýsingarnar eiga at verða lisnar og skiltar saman við roknskaparháttinum, sum leiðslan hevur einaábyrgd av at velja og seta í verk.

**BRÚKTIR FAKLIGIR STANDARDAR OG STIGIÐ FYRI VISSU**
Okkara ábyrgd er at geva eina niðurstøðu við avmarkaðari vissu í samsvari við ISAE 3000 (dagførd), "Aðrar váttanir við vissu enn grannskoðan og gjøgnumgongd av søguligum upplýsingum". Standardin ásetur, at vit leggja ræettis og útinna okkara uppgávu fyri at røkka avmarkaða vissu fyri, um valdu lyklatølini eru uttan týðandi skeivleikar.

Ein uppgáva við avmarkaðari vissu er væl minni í vavi enn ein uppgáva við grundaðari vissu, bæði viðvíkjandi arbeiðinum í sambandi við meting av váðum, íroknað fatan av innaneftirlitinum, og tað, sum er gjørt grundað á metta váðan. Hetta viðførir, at stigið fyri vissu, sum verður fingið í sambandi við eina uppgávu við avmarkaðari vissu, er væl lægri enn vissan, sum hevði verið fingin í sambandi við eina uppgávu við grundaðari vissu.

Vísandi til ásetingarnar í uppgávuni, og okkara arbeiðið í hesum sambandi, hava vit lagt okkara arbeiði til ræettis við fylgjandi handlingum:

- Gjørt samrøður við viðkomandi starvsfólk, fyri at fáa kunning og innlit í dátur og upplýsingar hjá felagnum um varandi orkuframleiðslu felagsins.

- Gjøgnumgingið dátur fyri uppgerð av lutfallið varandi orkuframleiðslu, í mun til samlaðu orkuframleiðslu.

Handlingar, sum verða gjørdar í sambandi við eina uppgáva við avmarkaðari vissu eru ymiskar og minni í vavi enn uppgáva við grundaðari vissu. Hetta viðførir, at stigið fyri vissu, sum verður fingið í sambandi við eina uppgávu við avmarkaðari vissu, er væl lægri enn vissan, sum hevði verið fingin í sambandi við eina uppgávu við grundaðari vissu.

**ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR**
Leiðslan hjá SEV hevur ábyrgd av at innsavna viðkomandi tilfar og upplýsingar, leggja til ræettis og seta dátur upp, sum eru viðkomandi fyri geining av varandi orkuframleiðslu, samanborið við samlaða orkuframleiðslu, í tíðarskeiðinum 1. januar – 31. desember 2022. Hendan ábyrgd umfatar útrokning, uppgerð og framløgu av dátum, og øðrum týðandi viðurskiftum, og at leggja til ræettis og halda viðlíka innanhýsis eftirlit av upplýsingunum, sum viðkoma uppseting av tølunum í frágreiðingini, sum eru uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**ÁBYRGD OKKARA**
Vit hava ábyrgd av:

At leggja til ræettis og gera arbeiðið fyri at fáa avmarkaða vissu um dátur og upplýsingar í tilfarinum um lutfallið av varandi orkuframleiðslu, samanborið við samlaða orkuframleiðslu, í øllum týðandi lutum ikki hava týðandi skeivleikar í samsvari við meginreglurnar, sum eru grundarlag undir váttanini.

- Gera eina óhefta niðurstøðu grundað á arbeiðið, sum vit hava gjørt og prógvini, sum vit hava fingið

- Geva ein niðurstøðu til SEV og aðrar áhugapartar.

Tórshavn, 31. mars 2023

Januar P/F

Løggilt grannskoðanarvirki

Hans Laksá

Statsaut. revisor

**SEV**
Landavegur 92
Postbox 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

www.sansir.fo